LM-053/2022

Fylgiskjal 7

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, 23. februar 2023
J.nr.: 23/02453-2
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Hoyringssvar frá Umhvørvismálaráðnum til løgtingslóg um grundvatn

Umhvørvismálaráðið takkar fyri møguleikan at gera viðmerkingar til lógaruppskotið.

Umhvørvismálaráðið tekur undir við, at grundvatnið verður lagt í hóskandi lógarkarmar so til ber at verja og gagnnýta grundvatnið á skynsaman hátt við framtíðar trygging og varðveiting av grundvatninum í huga.

Aftaná tvíparta munnliga umrøðu og viðgerð av okkara viðmerkingum, hava vit lítið meira at leggja afturat enn, at revsiásetingin helst eigur at verða víðkað nakað og helst eisini til at heimila revsing í kunngerð.

At enda verður víst á, at Umhvørvismálaráðið veit um, at Umhvørvisstovan eisini hevur viðmerkingar til uppskotið, tó at vit ikki kenna ítøkiliga innihaldið. Vónandi er onki ósamsvar ímillum viðmerkingarnar hjá stovninum og ráðnum, men skuldi tað hent seg, er Uttanríkis- og vinnumálaráðið vælkomið at seta seg í samband við okkum fyri at rudda møgulig ósamsvar og ivamál av vegnum.

Vegna Umhvørvismálaráðið,

Anni á Hædd

Anni á Hædd, ráðgevi